1

## Avtala sambært § 2 í sáttmálanum millum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelag Føroya

§ 1

Henda avtala er gjørd sambært galdandi sáttmála millum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya (MSF) og Kommunulæknafelag Føroya (KLF) frá 1. oktober 2006 (Sum Heilsutrygd hevur yvirtikið pr. 1. januar 2010). Víst verður til §§ 2 og 50 stk. 4, tó uttan nr. 1001 og 1002 í § 72.

Landstýrismaðurin í heilsumálum hevur nú tikið endaliga avgerð um at fáa Sandoynna og Suðuroynna við í felags vaktarskipanina fyri Føroyar - § 2 avtalan frá oktober 2007 er enn galdandi, tó verður lagt aftrat, at Suðuroyggin og Sandoyggin verða við í vaktarskipanini.

§ 2

Framyvir koma fimm læknar at manna Læknavaktina um samdøgrið, ein visitatiónslækni og fýra koyrilæknar. Visitatiónslæknin er á vakt á vaktsentralinum og koyrilæknarnir røkja økini: Suðuroy, Sandoy, Suðurstreymoy/Váganar/Norðstreymoy og Eysturoyggin/Norðoyggjar. Viðmerkjast skal tó, at tað í náttartímunum bert eru tríggir koyrilæknar, í Suðri, á Sandoynni og ein fyri restina av meginøkinum.

Vaktirnar eru skipaðar á henda hátt:

- Gerandisdagar frá kl. 16.00 – 24.00
- Hálvar frídagar frá kl. 12.00 – 24.00
- Í vikuskiftum og halgidagar alt samdøgrið

§ 3

Vaktargjald verður goldið fyri hesar tíðir:

- Læknin á vaktsentralinum á náttarvakt (24.00 -08.00) kr. 425,00 fyri tíman
- Koyrilæknin kr. 125,00 fyri tíman

§ 4

Avtalan kann koma í gildið frá 1. februar 2011.

**Samstarvsnevndin**

**Avtala sambært § 2 í sáttmálanum millum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelag Føroya**

́rshavn tann 10. februar 2011

 samstarvsnevndina
largit Stórá, forkvinna

| | | |
|---|---|---|
| largit Stórá, forkvinna | Jaspur Petersen | Katrin Gaard |
| ten Larsen | Andor Ellefsen | Jan Danielsen |

**Samstarvsnevndin**